Heilsumálaráðið

Dagfesting: 05.03.2021
Mál nr.: 21/01046-25
Eftirkannað: 25.02.2021

Uppskot til

Løgtingslóg
um
at binda H- og B-bygningarnar á Landssjúkrahúsinum saman
og um at keypa neyðgenerator, tól og útgerð

§ 1. Landsstýrismanninum verður heimilað at gera avtalur um at binda H- og B-bygningarnar á Landssjúkrahúsinum saman og um at keypa neyðgenerator, tól og útgerð.
Stk. 2. Útreiðslurnar sambært stk. 1 kunnu í mesta lagi vera 71,8 mió. kr.

§ 2. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi 31. desember 2024.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar
Byggiverkætlanin við H-bygninginum er komin væl áleiðis. H-bygningurin og B-bygningurin skulu samanbyggjast. Talan er um teir báðar bygningarnar, ið eru klæddir við kopari. H-bygningurin er tann nýggi bygningurin, sum stendur við sjóvarmálan og er klæddur við vanligum kopari. B-bygningurin er tann bygningurin, ið er klæddur við eiraðum kopari og sostatt er eirgrønur á liti. Talan er um tríggjar hæddir í bygningunum báðum, ið skulu samanbyggjast.

Harumframt verður eisini biðið um heimild at gera avtalur um tann seinna neyðgeneratorin og tól og útgerð.

B-bygningurin
Bygningurin hevur 9 hæddir, har samanbinding við H-bygningin verður í trimum av hæddunum. Tað er í kjallarahædd, nevnd 0 (null), í móttøkuhædd, nevnd 1, og á aðru hædd, nevnd 2.

B0 er kjallarahædd í B-bygninginum. B0 er høvuðsfarleiðin til og frá H0 við flutningi av matvognum, viðgerðarvørum, klæðum, línklæði, seingjum o.ø. B0 er ájavnt við H0 í H-bygninginum, har endurvenjing og viðtaludeild á Psykiatriska deplinum verður.

B1 er móttøkuhæddin í B-bygninginum. B1 er høvuðsfarleiðin til og frá H1 hjá brúkarum, avvarðandi og vitjandi. Henda er ájavnt við H1 í H-bygninginum, ið er seingjadeild.

B2 er onnur hæddin í B-bygninginum. B2 er høvuðsfarleiðin til og frá H2 hjá kliniskum starvsfólkum og til flutning av sjúklingum. Hetta kann vera frá H2 til t.d. skurðstovu, røntgen og skopi. Henda er ájavnt við H2 í H-bygninginum, ið er seingjadeild við millum annað føðistovum.

Viðgerð, ið hevur verið av málinum
Við seinastu lógarbroytingini í løgtingslóg um at høvuðsumvæla, útbyggja og nútíðargera Landssjúkrahúsið, sí løgtingsmál 44/2019, varð heimild veitt til prosjektering til at binda H- og B-bygningarnar saman.

Henda tekstviðmerking varð sett í viðmerkingarnar tá: "*Verkætlanin H-bygningurin hevur havt eitt greitt arbeiðstøkumark, ið er útsíða á B-bygninginum. Nú er tíðin búgvin til, at prosjektering má gerast fyri, hvussu umbyggingin í B-bygninginum verður loyst, so sambandið millum B-bygningin og H-bygningin fer at virka á fullgóðan hátt. Hetta hevur ikki verið fevnt av sáttmála við ráðgevar og arbeiðstakarar. Eitt prosjekt, ið greitt greinar, hvussu arbeiðini skulu fremjast, skal vera liðugt, áðrenn tilboð kunnu heintast frá arbeiðstakarum. Arbeiðini mugu setast í gongd nakað skjótt, so tey verða liðug, tá H-bygningurin skal takast í nýtslu í 2021..... Tá ið prosjektið er klárt, fer tað at verða brúkt til grundarlag í eini komandi nýggjari verklagslóg til endamálið....*"

B0
Í kjallarahæddini í B-bygninginum, B0, er talan um serliga umfatandi umbygging.

Einasta og skynsamasta leiðin at koma til H-bygningin frá B-bygninginum er gjøgnum økið, har tað nú millum annað er skiftirúm hjá starvsfólkum, hjárúm til kapellið, goymsla og seingjareiðing (seingjavask). Hesi mugu flytast og verða m.a. nýggj skiftirúm staðsett í H2 og í B0, har seingjareiðing er í dag.

Í hesi umbygging verða atlit t.d. tikin til, at rýmingarleiðin frá øllum 9 hæddunum kemur niður nærindis í hesum økinum, eins og til, at høvuðstalvurúmið til el er har. Eisini er sektiónsstovan (líkskoðan) í hesum økinum.

B0 tekniskar leiðingar
Umfatandi umleggingar skulu gerast á el- og rørskipanir, soleiðis at H-bygningurin verður skynsamt knýttur at teknisku skipanunum í B-bygninginum og restini av sjúkrahúsøkinum.

Har skulu veggir, el og rørskipanir til vatn, kloakk, spillvatn, ventilatión o.l. beinast burtur, og nýggj útgerð setast upp.

Skipanirnar til medisinska luft skulu nú eisini fevna um H-bygningin, eins og vakuumskipanin til súgv í øllum seingjastovunum í B-bygninginum og H-bygninginum skal tað. Útgerðin skal endurnýggjast, m.a. tí verandi kompressarar eru ov smáir.

Rørarbeiðið verður gjørt í einum, í eini felags loysn.

Mett verður, at um 70% av øllum kostnaðinum verður á B0, har væl meiri verður brúkt til tekniska partin enn til bygningsbroytingar.

B1
Í móttøkuhæddini í B-bygninginum, B1, skulu gólv og veggir gerast á umleið 130 m^2. Eisini skal brunaskilnaður gerast millum H-bygningin og B-bygningin.

Mett verður, at um 10% av øllum kostnaðinum verður á B1.

B2
Á aðru hædd í B-bygninginum, B2, skulu gólv og veggir gerast á umleið 130 m^2. Fyri at fáa fulla breidd á gongina millum bygningarnar verður ein partur av einum læknakonferansuhøli tikin niður. Eisini skal brunaskilnaður gerast millum H-bygningin og B-bygningin.

Mett verður at um 20% av øllum kostnaðinum verður á B2.

Kostnaðurin at binda H-bygningin og B-bygningin saman er 42,8 mió. kr.

Neyðgeneratorur
Fyri at tryggja raksturin hjá Landssjúkrahúsinum er neyðugt við einum tryggum neyðstreymsverki, soleiðis at tveir neyðgeneratorar verða staðsettir í nýggja H-bygninginum. Í verandi ætlan er ein generatorur við. Við hesum verður biðið um tann seinna. Hetta neyðstreymsverk skal tryggja, at allar kritiskar funktiónir í H-bygninginum virka, hóast streymslit er. Veitingartíðin fyri ein neyðgenerator er áleið 6 mánaðir.

Kostnaðurin fyri seinna neyðgeneratorin er 3 mió. kr.

Tól og útgerð
Í eini tilgongd har øll gott 500 rúmini eru gjøgnumgingin við ráðgevum og brúkarum, er komið fram til, at tað vanta um 26 mió. kr. til tól og útgerð.

1.1. Orsakir til uppskotið
Uppskotið er gjørt fyri at fáa heimild at fara undir verkætlanina at binda H- og B-bygningarnar á Landssjúkrahúsinum saman og um heimild at keypa neyðgenerator, tól og útgerð.

B-bygningurin hevur 9 hæddir, har samanbinding við H-bygningin verður í trimum av hæddunum. Tað er í kjallarahædd, í móttøkuhædd og á aðru hædd. Serliga umfatandi verður arbeiðið í kjallarahæddini í B-bygninginum, har nógvar tekniskar skipanir eru, ið H-bygningurin skal verða knýttur at.

1.2. Galdandi lóggáva
Eingin galdandi lóggáva er um at binda H- og B-bygningarnar á Landssjúkrahúsinum saman og um at keypa seinna neyðgeneratorin, tól og útgerð.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við lógaruppskotinum er at fáa samanbundið H-bygningin og B-bygningin, soleiðis at sjúkrahúsraksturin kann gerast so skynsamur sum gjørligt. Harumframt at fáa neyðstreymsverkið dagført og tól og útgerð til H-bygningin.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Lógaruppskotið hevur við sær, at tað verður beinleiðis samband ímillum nýggja H-bygningin og B-bygningin á trimum hæddum. Ein gong verður sostatt ímillum B0 og H0, B1 og H1 og ímillum B2 og H2. Serliga umfatandi er umbyggingin tó á B0. Eisini verður neyðstreymsverkið dagført, og tól og útgerð koma afturat til H-bygningin.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Lógaruppskotið er gjørt í tøttum samstarvi millum Landsverk og Landssjúkrahúsið. Viðmerkingar frá pørtunum báðum eru arbeiddar inn í lógaruppskotið. Lógaruppskotið hevur verið til hoyringar hjá Fíggjarmálaráðnum, sum mælir til, at støða verður tikin til játtanarspurningin, samstundis sum støða verður tikin til verklagslógina.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Landsstýrismanninum verður heimilað at gera avtalur um at binda H- og B-bygningarnar á Landssjúkrahúsinum saman, og at gera tilhoyrandi broytingar, serliga í B-bygninginum, umframt um at fáa neyðstreymsverkið dagført og um tól og útgerð fyri 71,8 mió. kr.

Tíðarætlan:
Arbeiðið at byggja verður sett í gongd, so skjótt játtan er tøk, og er neyðugt við eykajáttan til endamálið í 2021. Arbeiðið verður mett at verða liðugt um somu tíð, sum flutt verður inn í H-bygningin.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar við sær fyri Landsverk og Landssjúkrahúsið. Uppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri kommunalar myndugleikar.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur ta avleiðing, at størri eftirspurningur verður eftir tænastum frá byggivinnuni komandi árið.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar við sær fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

2.9. Markaforðingar
Lógaruppskotið elvir ikki til markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir, ella ger onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Uppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Uppskotið hevur við sær at landsstýrismanninum verður heimilað at gera avtalur um at binda H- og B-bygningarnar á Landssjúkrahúsinum saman og um at keypa neyðgenerator, tól og útgerð. Uppskotið leggur ikki heimildir til ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Í lógargreinini verður heimilað landsstýrismanninum at gera avtalur um at byggja og umbyggja á Landssjúkrahúsinum innan ávísa upphædd.

Mælt er til, at verklagslógir galda 2 ár eftir mettu byggitíðina. Henda verkætlan verður mett at vera komin at enda í 2022, og verður gildistíðin fyri verklagslógina tí ásett til 31. desember 2024.

Til § 2
Gildiskomuáseting.

Heilsumálaráðið, 5. mars 2021

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður

/ Turid Arge

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Fýra tekningar, ið vísa øki fevnt av samanbygging o.a.
Fylgiskjal 2: Kostnaðarmetingar, fýra skriv frá Landsverki
Fylgiskjal 3: Hoyringarsvar frá Fíggjarmálaráðnum
Fylgiskjal 4: Hoyringarsvar frá Landssjúkrahúsinum, tveir teldupostar
Fylgiskjal 5: Hoyringarsvar frá Landsverki